## DAGSINS MEINING

# Útjaðaramenning?

Útjaðarin hevur altíð verið ovarlaga á politiska breddanum í Føroyum. Tað er eingin ivi um, at tað er eitt politiskt ynski, um at stuðla útjaðarnum. Intentiónirnar eru ivaleyst tær allarbestu frá øllum síðum, men síggjast nøkur úrslit?

Í farna valskeiði kom eitt útoyggjaálit, ið m.a. kom við nógvum uppskotum um, hvussu fólk á útoyggj kunnu forvinna sær pening. Harafturat var ætlanin at seta ein útoyggjafulltrúa og útoyggjastevnur hava verið hildnar. Alt hetta er ivaleyst gjørt í bestu meining, og man ikki hava havt negativa ávirkan, men spurningurin er, um hetta er vegurin.

Tað kann tykjast svartskygt, men neyvan býr nakar ella fer nakar at búgva á útoyggj, tí at møguleikarnir at vinna sær pening eru bestir har. Tað eru helst aðrar minni materiellar orsøkir til at búgva á útoyggj, og eiga vit at frøðast um tað, tí útoyggjarnar gera Føroyar ríkari sum land, og eru bindilið til eina farna tíð. Tá tað er sagt, so vil tað altíð verða ein avviging, í hvussu stóran mun tað almenna skal stimbra búseting á útoyggj ella rættari sagt gera tað meir liviligt fyri tey, ið búleikast har.

Framferðin við útoyggjastevnum og uppskotinum um ein útoyggjafulltrúa tykist í ein stóran mun verða sjónleikur, tí samstundis sum alt hetta hendir, so verður flutningsstuðulin skerdur, posttænastan verður skerd og ferðaseðlaprísir hjá Strand-ferðsluni fara upp. Landstýrið tekur við einari hond, og hugnar um við hinari við at skipa fyri stevnum. Tað tykist sum sjónleikur skal taka fokus frá tí stýri, ið í roynd og veru er stýrið í útoyggjamálum. Lívæðrin til útoyggjarnar er ferðasamband og samskifti, ið bæði hoyra til Vinnumálaráðið. Høvuðsvinnan á útoyggj er landbúnaður, ið eisini hoyrir til Vinnu-málaráðið. Tað er tí sera løgið, at útoyggjamál ikki liggja undir vinnumálum, tí Vinnumálaráðið avger í ein stóran mun, hvussu livilíkindini eru á útoyggj.

Nú eru røddir aftur frammi um at steðga við koyringini hjá Strandferðsluni. Eins og flutningsstuðulin er hetta eitt mál, ið ikki kemur at merkjast í miðstaðarøkinum, men kemur at merkjast sera hart í útjaðarnum. Her, eins og í málinum um flutningsstuðulin, er tørvur á, at vinnumálaráðharrin tekur atlit til útoyggjarnar. Landstýrið átti kanska at umhugsað, at lagt útoyggjamál formelt undir Vinnumálaráðið. Kanska peningurin, ið er settur av til útoyggjafulltrúa var betur brúktur, um hann fór til øktan flutningsstuðul ella til at betra um postflutningin til útoyggjarnar. Peningur er ikki so nógvur til, og tí er umráðandi fyri útoyggjarnar, at hvør króna verður brúkt, har hon gagnar mest.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Teir munnhøggast við niðursetandi skuldsetingum – Føroya fólk er ørkymlað

**Sverri Midjord**



Høgni Hoydal sigur fyri øllum Føroya fólki, at tað, ið Fólkaflokkurin sigur, ikki er eftirfarandi. Tað eru ring tíðindi, ið samgongan, Fólkaflokkurin við løgmanni á odda, ber. Teir siga ósatt, teir eru ikki at líta á. Hørð orð – søgd 3. juli 2003. Men hóast skuldsetingar, sum ein vanligur føroyingur ikki hevði latið farið fram við borðinum. Men Fólkaflokkurin letur ikki við seg koma, og Tjóðveldisflokkurin heldur fast við maktina. At varaløgmaður er sum tey, ið ganga á bingo. Hann heldur seg hava fingið ferð á fullveldisørskap teirra av einum skjali, ið danski forsætisráðharrin skrivaði undir á Tvøroyri. Eitt skjal, sum í veruleikanum ikki segði annað enn tað, heimastýrislógin boðar frá. P.M. Dam sáli segði, at heimastýrislógin var so rúm, at hon gekk at loysingini, men tað kostar. Vilt tú valda, so mást tú gjalda. Tað, ið er vandamikið við nýggja skjalinum, er at nú kann løgmaður av sínum eintingum yvirtaka.

Hugsið tykkum Høgna Hoydal sum løgmann við slíkum heimildum. Teir vilja fullveldi, samstundis sum teir skerja at beini tann rættin, sum gomul og sjúk eiga. Teir hava onki ímóti at yvirtaka og gjalda danskar skyldur, men skerja rættindi hjá gomlum og sjúkum.

Verandi samgonga hevur víst, at hon ikki megnar at stýra okkara lítla samfelagi.

Finski statsministarin varð noydd at leggja frá sær, tí hon hevði sagt ósatt.

Her á landi ber alt til. Hvør kann hava álit á hesum monnum? Teir hava ikki álit á sær sjálvum.

Neyðars neyðars Føroya land.

# Hamskifti

**Sigfríður Olsen**



Í valstríðnum undan seinasta løgtingsvali legði okkurt av valevnum Tjóðveldisfloksins harðliga út eftir fakfeløgunum og tess leiðarum. Hetta fór tó friðarliga aftur við borðinum, við tí í huga, at viðkomandi helst hevði fingið tað skeiva beinið úr seingini henda dagin, greinin varð skrivað.

Árið, ið farið er, eftir at samgongan var endurskipað, vísir tó, at talan als ikki er um nakað skeivt bein ella ein sonevndan "off day". Harafturímóti er talan um eitt rættuligt hamskifti hjá størsta samgonguflokkinum, eina verunliga avbjóðing.

Øll kenna vit leiklutin hjá fíggjarmálaráðharranum mótvegis fakfeløgunum. Uttan at taka burt virðingina viðvíkjandi treiskni og støðufesti í fíggjarmálum, mugu vit tó spyrja, um uppílegging hansara hevur verið tilvildarlig (vanlig "klossutheit") ella tilvitað og tilætlað!

Formaður Tjóðveldisfloksins tekur fult undir við fíggjarmálaráðharranum, men sigur seg tó virða tann rætt, ið fakfeløgini hava!!

Eitt av løgtingsumboðum Tjóðveldisfloksins kallar tað »at snobba niðureftir«, tá ein javnaðartingmaður fyri góðum tveimum árum síðan vísti fakfeløgunum beinleiðis solidaritet!!!

Og so Fregnir. Á dú, á dú. Tit minna okkum, við oddagreinini »Arbeiðarafjøldin misleidd«, bara enn einaferð á, at víttgangandi nationalistar altíð hava verið, eru, og altíð fara at verða vandamiklir, tá tað snýr seg um frælsi. Hetta tí, at tit hava tikið tykkum einarætt uppá frælsi!!!!

Tað, ið **undrar** meg, er, at Tjóðveldisfólk lata hetta fara aftur við borðinum, sum um vóru hetta nakrir tankatoskar. Veit, at tað enn finnast tjóðveldisfólk, ið taka fult undir við fakfeløgunum og tess leiðarum.

Tað, ið **ræðir** meg, er tann líkasæla, ið leiðsla Javnaðarfloksins og vit javnaðarfólk sum heild sýna.

Hamskiftið hjá Tjóðveldisflokkinum er eitt beinleiðis álop á frælsið. Og tað eiga vit javnaðarfólk ikki at lata okkum lynda.

# Rættleiðing

Í blaðnum í gjár prentaðu vit eina grein, sum Jógvan Sundstein hevur skrivað í mars í 2000. Hann sendi okkum greinina nú, tí at leikluturin hjá løgtingsins umboðsmanni hevur verið umrøddur seinastu tíðina. Jógvan Sundstein nevndi eisini, at hann saknaði eina eftirmeting av landsfyrisitingini. Av misgávum kom henda, sera viðkomandi, viðmerkingin ikki í blaðið saman við gomlu greinini – og tí sá tað út sum um, at Jógvan Sundstein kom sum ketta úr høvdatrog. Sigast skal, at tað er blaðið, ið hevur ábyrgdina av hesum mistakið.

Vinarliga umberið.

**blaðstjórin**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Svar til Føroya Arbeiðarafelag

**Lág løn og lítil pensión eru treytirnar hjá fólki, sum mugu liva av teimum úrslitum, ið Ingeborg Vinther hevur nátt sum formaður í FA. Tí ber ikki til at lúgva seg frá.**

**Jonhard Mikkelsen**
*Blaðstjóri í Fregnum*

Ein mánað eftir at ein oddagrein um arbeiðsmarknaðarviðurskifti hevur staðið í Fregnum, kemur stjórnin í Føroya Arbeiðarafelag í dag við einum svari.

Innihaldið í svarinum er (og tað er neyvan av tilvild!) neyvt tað sama sum í einum lesarabrævi hjá Kristiani Magnussen um sama mál. Í báðum brøvum eru somu feilir, somu lygnir og sama roynd at reingja veruleikan.

Fyri tað fyrsta sigur leiðslan í FA, at oddagreinin í Fregnum var ein niðurgerðing av vanliga føroyska løntakaranum. Tað var hon ikki á nakran hátt. Talan var hinvegin um hvassa atfinning at leiðsluni í FA. Atfinningin varð grundað á tann veruleika, at leiðslan í hesum felag farnu 20 árini ongi verulig úrslit hevur at vísa á. Lág løn og lítil pensión eru treytirnar hjá fólki, sum mugu liva av teimum úrslitum, sum Ingeborg Vinther hevur nátt eftir 20 ár í leiðsluni fyri FA.

Ingeborg og hennara svornu fólk hava ofrað ørandi upphæddir upp á verkføll farnu nógvu árini. Harvið hava tey minkað munandi um ta kakuna, sum allir landsins borgarar hava at býta. Hevði úrslitið verið góð løn og góð rættindi til limirnar, hevði borið til at vart tað. Men tað er tvørturímóti. Tey, sum hava mist mest - nógv mest - av øllum verkføll-unum, eru júst limirnir í FA.

Pengarnir hjá verkafólkinum, sum Ingeborg & Co hava oyðslað upp í drúgvum verkføllum, eru aldrin vunnir aftur. Limirnir í FA eru snøggliga endaðir í samfelagsins 4. deild.

Tað var hetta, eg vísti á í oddagreinini. Og tað standi eg við, tí tað er ein óvikandi veruleiki. Tað er ikki atfinning at landsins verkafólki. Tað er atfinning at Ingeborg Vinther og hennara framferðarhátti.

### Verkfalsrættur

Stjórnin í FA sigur seg eisini muga "staðfesta, at Fregnir beinleiðis mælir til, at Løgtingið tekur frá okkum fakfeløgum rættin til at lýsa verkfall".

Hetta er eisini lodrøtt lygn.

Í oddagreinini varð mælt til, at arbeiðsrættur verður settur á stovn, og at tað verður gjørt ólógligt at lýsa verkfall uttan so, at limirnir í fakfeløgunum eru slopnir at siga sína hugsan um tað fyrst. Er meirilutin ímóti, skal einki verkfall vera. Við øðrum orðum: Ingeborg & Co. skulu missa rættin at lýsa verkfall, tá ið tað er ímóti viljanum hjá landsins verkafólki.

Tað hevði ikki verið at avtikið verkfallsrættin. Tað hevði verið at tikið verkfallsrættin úr hondunum á Ingebrog & Co., og latið hann upp í hendurnar á limunum í t.d. FA.

Tá ið hugsað verður um, hvussu nógv landsins arbeiðarar hava bløtt undir teimum mongu verkføllunum farnu árini, er tað ikki meira enn natúrligt, at teir fáa beinleiðis ávirkan á, um verkfall skal verða lýst ella ikki.

Verkfalsrættur skal eftir mínum tykki vera rætturin hjá arbeiðsfólki at velja at fara í verkfall. Tað skal ikki vera rætturin hjá ábyrgdarleysum fakfelagsleiðslum at tvinga fólk út í verkfall ímóti teirra vilja.

### Politisk manipulering

Stjórnin í FA lýgur sostatt, tá ið hon sigur, at Fregnir hava niðurgjørt verkafólk og mælt til at taka verkfalsrættin av.

Tað skilji eg sum so væl, tí hesi fólk ræðast sítt egna verk. Tey ræðast sannleikan um tey verkføll, tey hava lýst farnu mongu árini. Tey ræðast tann veruleika, at tey miðvíst hava grivið støðið undan sínum egnu limum.

Men tá ið tey síðani fremja ein fúlan partapolitiskan leik, avdúka tey seg meira, enn gott er.

Tey royna nevniliga at gera Tjóðveldisflokkin til upphavsmann til tær lygnir, tey føra fram. Tað eru ikki bara Fregnir, sum niðurgera verkafólk og vilja skerja teirra rættindi - nei, tað er sanniliga eisini Tjóðveldisflokkurin! siga tey.

Eg veit ikki hvørja støðu Tjóðveldisflokkurin hevur til tað, sum varð umrøtt í oddagreinini. Vóni bara, at hesin flokkur eins og allir aðrir flokkar er sinnaður at rudda upp í okkara avoldaðu skipan á arbeiðsmarknaðinum. Tí skuldi møguleiki verið fyri. Higartil eru tað ið hvussu er bara leiðandi javnaðarmenn, sum hava boðað frá, at teir halda anarki og lógloysi vera tann rætta karmin um okkara arbeiðsmarknað.

Hesir javnaðarmenn stuðlaðu undir síðsta verkfalli fakfelagsleiðslunum púra treytaleyst. Og teir royndu at misbrúka síðsta verkfall politiskt við at seta Tjóðveldisflokkin upp sum tann stóra "verkamannafíggindan".

Nú roynir leiðslan í FA so við lygnum eisini at gera Tjóðveldisflokkin til "verkamannafígginda". Og brævið hjá leiðsluni minnir, sum sagt, serstakliga nógv um eitt bræv hjá Kristiani Magnussen.

Tað er áhugavert. Tað bendir á ógvuliga tætt samstarv millum kreftir, sum hava eitt og sama mál: at sleppa í Tinganes. Og offrini í hesum leiki er føroyska verkafjøldin.

# Heimastýrislógin og yvirtøkuleisturin hjá samgonguni

**Johan Dahl**
*Løgtingsmaður*



Tað hevur verður áhaldandi ført fram av Fólkafloks- og Tjóveldismonnum at hesin ætlaði sokallaði "nýggi" hátturin at yvirtaka málsøki uppá, er so nógv annarleiðis og betri enn tann, sum heimastýrislógin ásetur í § 2 og § 3, sum eru soljóðandi:

**§ 2.** Tey mál og málsøki, sum sett eru undir A í tí lista, ið sum skjal er bundin til hesa lóg, verða prinsipielt at rokna sum føroysk sermál. Føroyska heimastýrið kann gera av, at øll hesi mál og málsøki ella nøkur av teimum verða beinan vegin at flyta til heimastýrið við teirri fylgju, at heimastýrið tekur uppá seg tær útreiðslur, ið fylgja við teimum. Við somu fylgju kann heimastýrið seinni gera av, at mál og málsøki, sum ikki beinan vegin verða yvirtikin, skulu verða flutt til heimastýrið. Á líknandi hátt hevur heimastýrið skyldu at taka við málum og málsøkjum á listanum, tá ríkisvaldið ynskir tað.

**§ 3.** Viðvíkjandi teimum á listanum undir B settu málsøkjum verður eftir nærri samráðing gjørt av, um og í hvørjari vídd hesi mál kunnu verða flutt til føroysk sermál.

Trupuleikin hjá loysingarmonnunum er eyðsýndur, teir slettis onki hava fingið burturúr sínum fullveldispolitikki, og nú teir eru á "falderebet", royna teir enn einaferð at lumpa seg ígjøgnum við hesum sokallaða nýggja yvirtøkuleistinum.

Tá Petur Mohr Dam sáli segði, at hetta var fagrasta blað í søgu Føroya og "heimastýrislógin røkkur líka røkkur líka at loysingini" so er hetta so satt sum tað er sagt.

At Javnaðarflokkurin so loypir við báðum beinum í felluna hjá Anfinni og Høgna, tað er sera ringt at skilja - vónandi hava teir ikki hugsað seg nóg væl um, tí - tað eru als ongar juridiskar forðingar fyri yvirtøkum í tí løtu Løgtingið hevur avgjørt at yvirtaka eitt málsøkið sum føroyskt sermál og samstundis yvirtekur kostnaðin av hesum øki.

Hinvegin so kann fólkatingið eisini áleggja okkum at yvirtakað málsøkir .

### Hvar er trupulleikin við verðandi heimastýrislóg?

Tað eru rætt og slætt ongir trupuleikar, uttan teir sum politiskt eru skaptir av sitandi samgongu

Líka síðan heimastýrislógin kom í gildi hava vit kunna yvirtikið øll málsøkir undir lista A, vit kunnu uttan hóvasták avgera um vit vilja yvirtaka beinanvegin, eitt nærri ásett tíðspunkt ella slettis ikki.

Við nærri samráðinugum millum danskar og føroyskar mynduleikar kunnu vit, - um løgtingið samtykkir tað - eisini yvirtikið tey mál sum eru undir lista B.

Sum áður sagt, - er meirilutið fyri yvirtøkum í løgtinginum, so er málið at kalla ein avgreiðslu-spurningur millum partarnar.

Tey málsøkið, sum ikki beinleiðis eru nevnd í verandi heimastýrislóg, man neyvan verða nakar ivið um kunnu avklárast við samráðingum millum partarnar, tað prógvar siðvenjan.

### Rætt og Hevdsrættur okkara:

Sambært Frederik Harhoff professara, so hevur heimastýrislógin vunnið sær grundlógarstatus ígjøgum hesi gott og væl 50 árini, hon hevur verið vælvirkandi og til stóra menning fyri føroyska samfelagið.

Vit hava eina vælvirkandi heimastýrislóg í ríkisfelagskapinum, sum eins og arðar lógir sum eru gjørdar fyri 50'árum síðani, treingir til justeringar og broytingar soleiðis, at hon livir upp til tey krøv, sum nú einaferð verða stillað samfelagnum ídag, og nýskipanaruppskot Sambandsfloksins tekur nevniliga hædd fyri neyðugu broytingunum sum krevjast av nútíðini.

Við at venda øllum á høvdi í panikki - tí tað er tað sum Høgni og Anfinn báðir gera, so er stóru vandi fyri at vit missa tann rætt og hevdsrætt, sum vit við heimastýrislógini hava vunnið okkum gjøgnum 55 ár, tað ein sannur missur fyri føringar.

### Hvat siga tey moderatu fólkafloks- og sjálvstýrisfólkini til hetta?

Eg fái meg illað at trúgva, - at tey moderatu sjálvstýrisfólkini bæði í Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum vilja hendan leist - tí tey vita, at tey sjálvi og restin av Føroya fólki verðabóndafangað av hesum populistisku politisku snillingunum – Anfinni Kallsberg og Høgna Hoydal saman við superstrategi Fólkafloksins, Óla Breckmann.

Mín áheitan á teir Fólkafloks- og Sjálvstýrisfloks veljarar, sum enn ikki eru farin at dansa um loysingargullkálvin er at lata tykkara rødd ljóða og gerið tykkara støðu galdandi innanfloks.

Um tit ikki verða hoyrd har, skulu tit verða vælkomin at mynstra umborð á tí EINASTA flokkin, sum framhaldandi er fyri ríkisfelagskapinum og áhaldandi arbeiðir góðum og uppbyggjandi samstarvi, rúmum ræsum og bestu korum fyri alt Føroya Fólk – innan ríkisfelagskapsins karmar.